Jógvan Linklett, málmansvenjari hjá KÍ:

KÍ skorar ikki mál

Tað gongur, sum øllum kunnugt, ikki væl hjá KÍ, sum nú er útsligið í steypakappingini. – Tað er ilt at siga, hvat tað er, sum er galið. Spælið er hampuligt, men alt ov fá mál fara inn í kassan hjá mótstøðuliðinum, sigur Jógvan Linklett

FÓTBÓLTUR
Solby A. Eliasen

– Leikararnir eru sjálvandi sera keddir av hesum, men tað nyttar onki. Nú má tað hyggjast frameftir. Landskappingin byrjar fyrst í mai, og um ein kann síggja nakað positivt í at vera útsligin í steypakappingini, so er tað, at leikararnir hava ikki nakran dyst at hugsa um komandi 14 dagarnar, bert venjing, heldur Jógvan Linklett.

– Leikararnir hava vant nógv og hart, so kondi manglar teimum ikki, men heldur kampvenjing. Vit komu so seint í gongd við kampvenjingarnar á vøllinum, orsakað av tí nógva kavanum, sum var sera drúgvur tíðliga í vár, sigur Jógvan Linklett.

– Eg veit ikki rættiliga, hvat hendi, men eg gjørdi faktiskt ikki so nógv annað enn at bukka meg niður, sigur Jógvan Linklett um slitnaðu hælsinuna

Mynd: Solby A. Eliasen

Fekk skaða undir venjing

Og tað er ikki bert hjá KÍ liðinum, at tað gongur tann skeiva vegin. Málmansvenjarin var so óheppin at koma til skaða og slíta sær hælsinuna undir venjing herfyri.

Jógvan greiðir soleiðis frá tilburðinum:

– Eg veit ikki rættiliga, hvat hendi, men eg gjørdi faktiskt ikki so nógv annað enn at bukka meg niður. Tá hoyrdi og føldi eg eitt brak. Eg visti ikki, hvat tað var og føldi ikki so nógva pínu.

– Men tað gjørdist skjótt greitt, at eg hevði slitið hælsinuna og eg bleiv lagdur undir skurð. Og aftan á skurðviðgerðina kom pínan. Eg hevði nógva pínu í einar tveir dagar.

Skal hvíla

Hann hevur fingið boð um at taka tað róligt líka til 30. juni, so hann verður ikki nógv at síggja á fótbóltsvøllinum framyvir.

– Niðan á vøllin, tað ætli eg mær, kortini sigur hann.

– Man fær altið rópt, um man ikki fær brúkt beinið, sigur Jógvan, sum nú skal læra seg at ganga við høkjum.

Hann skal ganga við gipsi inn til 12. juni. Restin av tíðini skal nýtast til uppaftur venjingar.

Hann sigur, at hetta kom sum eitt heksaskot.

– Eg havi vant við liðinum líka frá tí teir byrjaðu. Havi altíð hita upp og strekt væl út eftir venjingarnar. So hetta er bert nakað sum hendir, óansæð.

Málmansvenjing

Jógvan hevur, sum sagt, tikið sær av málmansvenjingini hjá KÍ í ár.

– Ja, Kurt orðaði tað við meg aftan á seinasta dystin hjá KÍ í fjør. Og so ringdi hann til mín, tá tað varð greitt, at hann skuldi vera venjari hjá KÍ hetta kappingarárið, greiðir Jógvan, sum ikki hevur roynt málmansvenjing áður, men heldur at tað er spennandi at fáast við. Hann hevur sjálvur drúgvar royndir millum málstengurnar. Hann var málverji hjá KÍ frá 1975 til hann í 1987 takkaði fyri seg.

Hetta tíðarskeiðið var hann bert burtur frá 1983 til 85. Hann bleiv mettur at vera ein tann besti málverjin í Føroyum ta tíðina.

Hann heldur sjálvur, at tað er ein fyrimunur at hava ein málmansvenjara, tí tað lættir um arbeiðið hjá venjaranum. Hann heldur eisini, at tað at málmansvenjarin hevur royndir sum málverji, sjálvsagt, hevur nógv at siga.

– Um nakað er, sum málverjin ynskir at broyta, so sigur hann tað við meg. Og so tosi eg við Kurt um tað, sum so tekur avgerð, greiðir Jógvan, sum tó heldur ikki avsannar, at ein orsøk til vánaligu gongdina kann vera, at tað standa tveir óroyndir venjarar aftan fyri liðið.

Róðrarfelagið havt aðalfund

Um vikuskiftið hevði Róðrarsambandið árliga aðalfundin, og millum málini á skránni var møguleikin fyri at økja um talið av FM-stevnum í komandi róðrarárið.

Uppskotið fall á hesum sinni, men málið er á ongan hátt slept kortini, og varð tað álagt nevndini at koma við einum uppskoti um, hvar sjeynda FM-stevnan skal verða, um talið av stevnum skal økjast.

Annars var nevndarval eisini á skránni. Jóhannus Joensen, Hans David Hansen og Sjúrður Gullbein stóðu fyri valið, og vóru teir einmælt afturvaldir.

Annars verður meira at frætta frá aðalfundinum í mikudagsblaðnum.

-jm

Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

Bólkur 1	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 NSÍ	6	4	-	1	-	1	8	5	3	13
2 VB	6	4	-	0	-	2	15	11	4	12
3 B36	6	3	-	1	-	2	18	7	11	10
4 Sumba	6	0	-	0	-	6	3	21	-18	0

Bólkur 2	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 GÍ	6	3	-	3	-	0	11	5	6	12
2 EB/Str.	6	1	-	3	-	2	7	8	-1	6
3 FSV	6	1	-	3	-	2	6	8	-2	6
4 TB	6	1	-	3	-	2	9	12	-3	6

Bólkur 3	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HB	6	5	-	1	-	0	20	8	12	16
2 B68	6	3	-	0	-	3	14	12	2	9
3 Skála	6	2	-	0	-	4	9	18	-9	6
4 KÍ	6	1	-	1	-	4	11	16	-5	4

Málskjúttar, løgmanssteypið

Andrew á Fløtum	HB	7
Uni Arge	HB	6
John Petersen	B36	5
Nenad Zivanovic	VB	5
Jens Kristian Hansen	B36	4
Anders Nygaard	B68	4
Øssur Hansen	B68	4
Fróði Benjaminsen	B68	3
Jens Erik Rasmussen	FSV	3
Bartal Eliasen	GÍ	3
Súni Fríði Johannesen	GÍ	3
Jón Rói Jacobsen	HB	3
Heðin á Lakjuni	KÍ	3
Jónstein Petersen	NSÍ	3
Jonhard Frederiksberg	Skála	3
Alexander Radosavljevic	TB	3
Zoran Mancic	TB	3

Rógvi í stórari kapping

Liðið hjá Rógva Johansen fer fyrst í mai mánaði at luttaka í sera sterkari súkklukapping

SÚKKLING
Jákup Mørk

Cycling Aarhus Elite skal aftur í ár taka lut í kappingini, CSC Classic, sum er ein hin sterkasta kappingin, sum verður skipað í Danmark.

Vanliga sleppa bert tey allar sterkastu donsku liðini at taka lut í kappingini, men tá felagið hjá Rógva er við til at skipa fyri kappingini, stendur eisini teimum í boði at taka lut.

Millum mótstøðumenninar hjá Rógva í kappingini eru nakrir av sterkastu súkklarunum í heiminum, og millum annað er tour de France stjørnan, Laurent Jalabert, partur av feltinum, so tað er eyðsæð, at vónirnar hjá vágbinginum um at gera tær stórur skreytirnar ikki eru heilt so stórar hesaferð.

Rógvi Johansen fær aftur í ár møguleikan at taka lut í sterku donsku súkklukappingini, CSC Classic

Sjálvur tykist Rógvi tó heldur ikki at leggja so nógv í hetta. Hann er júst um at koma fyri seg eftir skaða, og tí hevur hann í fyrstu atløgu bert sett sær fyri at koma heilskapaður ígjøgnum kappingina. Nakað sum í sjálvum sær er trupult, tá koyrt verður við so nógvari ferð, sum í hesi kappingini, har miðalferðin vanliga liggur væl omanfyri 45 km/t.

VB-B36 3-1 (2-0):

VB vann heimavøllin

Vágbingar fóru framum B36 við sigrinum sunnudagin, og tryggjaðu sær sostatt heimavøll sum besti tvey'arin í bólkaspælinum

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk

Tað var plássið sum besti tvey'arin, sum stóð uppá spæl, tá B36 hóast verkfallið hevði lagt leiðina um Suðuroyarfjør at spæla seinasta dystin í bólkaspælinum. Fyrsta plássið hevði NSÍ longu ognað sær, tá Sumba ikki fekk mannað lið til dystin í Runavík, men sum støðan í bólkunum var, so var greitt, at besti tvey'arin skuldi finnast í bólki 1.

Serliga í fyrra hálvleiki var heimaliðið omaná, og hetta gav í seinna grundarlag fyri kontraspælinum, sum at enda avgjørdi dystin

Bragdlig VB-byrjan

B63 hevði helst ætlað, at hesin dysturin skuldi vera at kalla týdningarleysur hjá teimum, men tapið fyri NSÍ á heimavølli hevði í so máta oyðiliagt spælið hjá teimum, og sunnudagin var rættiliga skjótt greitt, at tað skuldi gerast meira enn trupult hjá havnarliðnum at bjarga nøkrum við sær úr Vági.

VB var nevnliga greitt við yvirlutan størsta partin av fyrra hálvleiki, og teir fingu eisini best hugsandi byrjanina, tá Nenad Zivanovic brádliga gjørdist leysur, so hann kundi leggja heimaliðið framum.

Hetta fekk á ongan hátt VB at flyta fótin yvir á bremsuna, men hildu teir allan fyrra hálvleik á við ágangandi spæli móti B36-málinum. Fleiri møguleikar spurdust burturúr, men tað var ikki fyrr enn stutt fyri steðgin, at hetta gav úrslit. VB fekk fríspark uttan fyri B36 brotsteigin, og Marek Vierzbicki smekkaði til, uttan at B36 málverjin hevði nakran møguleika at verja fyri.

Trýstið gav ikki úrslit

B36 skuldi nú skora tvær ferðir, og uppgávan sá kanska ikki heilt ógjørlig út, tá John Petersen tíðliga í seinna hálvleiki var fyrstur á einum skrábólti frá Bárður Mortansson.

Hetta gjørdist startskotið til eitt langt trýst oman móti VB málinum. Úr Vági verður sagt, at spælið hendan seinna hálvleiki kanska ikki var av tí allarbesta. Heimaliðið legði í stóran mun dent á verjupartin, fyri síðani at dúva upp á møguleikan fyri mótálopum, og tí var talan als ikki um sama góða fótbóltsspæl, sum tað hevði verið fyrra umfarið.

Gestirnir vóru hinvegin greitt omaná í flestum lutum, men har var tó eitt undantak. Tað lág ikki eins væl fyri hjá teimum at skapa sær teir stóru málmøguleikarnar. Alt ov ofta vóru ráðini bara at senda langar bóltar inn í VB-brotsteigin, og har var Bjarni Johansen ella onkur av hjálparmonnum hansara í verjuni aloftast hægstur, soleiðis at vandin varð beindur burtur.

Hinvegin vóru vágbingar ofta vandamiklir, tá teir fóru í mótálop. Einar tvær ella tríggjar ferðir áttu teir eisini at avgjørt dystin, men einsamallir við B36-málverjanum megnaðu teir ikki at senda bóltin í kassan. Ikki fyrr enn væl inn í yvirtíðina hjá dómaranum eydnaðist heimaliðnum at seta alt uppá pláss. B36 vildi kanska vera við, at Nenad Zivanovic var rangstaddur, men flaggið kom ikki upp, og einsamallir við málverjanum eydnaðist tað hesa ferð hjá jugoslavanum at senda bóltin í meskarnar.

Vunnu heimavøllin

Við sigrinum syrgdu vágbingar fyri, at teir á stigatalvuni fóru fram um B36, og tað merkir, at teir í fjórðingsfinaluni koma at spæla á heimavølli.

Mótstøðan í hesum dystum er eisini nakað lættari á pappírinum, enn hon verður hjá B36, tí lítið er at ivast í, hvør er favorittur, tá EB/Streymur kemur vestur á Eiðið dýra biðjudag. Tá skal B36 royna seg »á útivølli« móti HB, og ivaleyst hevði árstalsfelagið helst vilja bíðað við júst hesum dystinum sum longst, og í so máta kunnu tapini í teimum báðum seinastu dystunum í bólkaspælinum væl vísa seg at gerast kostnaðarmikil.

NSÍ vann uttan dyst

Sumbingar møttu ikki til dystin í Runavík, og tískil vann NSÍ bólkin, tó at teir bert vóru fýra ferðir á vøllinum

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk

Upprunaliga varð dysturin millum NSÍ og Sumba útsettur, tá sumbingar ikki høvdu nakrar serligar umstøður at ferðast í fyri tveimum vikum síðani.

Gjørt varð tí av, at Sumba skuldi koma norður til Runavíkar at spæla fríggjadagin, og at NSÍ sum ætlað skuldi spæla í Sumba sunnudagin. Hetta varð tó eisini av ongum, tí sumbingar sóu seg ikki føran fyri at manna lið, og tí boðaðu teir NSÍ frá, at teir ikki komu norður at spæla. Tað merkti so aftur, at Sumba misti heimavøllin í seinasta dystinum, og tá støðan sjálvandi ikki var stórt øðrvísi sunnudagin, vann NSÍ báðar dystirnar móti Sumba – og harvið bólkin – uttan yvirhøvur at spæla í seinasta umfarinum.

Keðiligt at missa dystir

Sjálvandi fegnaðust runavíkingar um, at tað eydnaðist teimum at vinna harða bólkin, men hinvegin vóru teir eisini sera harmir um, at teir við hesum mistu tveir týdningarmiklar dystir, har seinastu fyrireikingarnar undan landskappingini kundu fáast frá hondini.

- Hetta kemur sjálvandi tvørt fyri hjá okkum. Vit missa tveir dystir í kanska týdningarmesta partinum av fyrireikingunum, segði ein sera harmur Jógvna Martin Olsen, tá vit leygardagin fingu orð á hann, meðan hann eygleiddi tvey av møguligu móstøðuliðunum í fjórðingsfinaluni, B68 og KÍ.

Eingin fótbóltur varð leiktur við Løkin, tí mótstøðumenninir møttu ikki upp til dystin

Mynd: Álvur Haraldsen

Spurningurin er nú bert, hvussu kappingarnevndin hjá FSF handferð málið. Í líknandi dømum áður, er lið, sum ikki møtir til ásettan dyst, dømt at rinda 10.000 kr., umframt at dysturin er taptur, og væntandi verður hetta eisini sektin, sum Sumba fær.

Fyri runavíkingarnir er hetta tó ein lítil troyst. Teir mugu tó bara líta frameftir, og har er fyrsta uppgávan beint fyri stavn, tí fríggjadagin koma vágamenn á vitjan, og tá verður so neyðugt við einum sigri, um plássið í hálvfinaluni skal tryggjast.